VÍF-H71 31-25 (13-10)

VÍF heldur kósina

Venjingarstøðan er góð

Um góða byrjanina, sum vestmenningar hava fingið upp á kappingarárið, sigur Hjalmar Klein Olsen, at venjingarstøðan í ár hevur verið góð frá byrjan.

– Eg havi havt allar leikarar tøkar síðani fyrst í august mánaði, og hetta hevur avgjørt virka positivt á venjingarstøðuna. Eisini vóru vit á Lanzarote á venjingarlegu, so alt í alt haldi eg leikararnar vera sera væl fyri.

Um hópin til dystin sunnudagin sigur venjarin annars, at hann helst verður tann sami, sum á Skála, og merkir hetta sostatt, at Áki Olsen allar helst enn ikki er 100% til reiðar at spæla.

Sigursrøðin hjá VÍF heldur fram, og sunnudagin vórðu tað hoyvíkingar, sum máttu boyggja seg

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Hóast ein munur upp á seks mál ikki tykist so øgiliga stórur, so mundi ivin um úrslitið í Vestmanna ongantíð verða hin heilt stóri.

Annað var kanska heldur ikki væntandi, tí mett eftir úrslitunum seinasta kappingarár, umframt teimum broytingum, sum báðum liðunum hevur verið fyri, so var styrkismunurin á pappírinum stórur.

Lítil ivi

VÍF var eisini liðið, sum byrjaði dystin nógv betri, men eftir at teir fyrstu løtuna høvdu hótt við at bumba gestirnar heim aftur, stóð eina løtu stilt hjá teimum gulu.

Gestirnir megnaðu sostatt at koma nakað aftur í aftur, og eina løtu í fyrra hálvleiki stóð eisini á jøvnum, men so dragnaði tó aftur.

Beinan vegin, sum seinni hálvleikur byrjaði, øktu vestmenningar aftur um leiðsluna, og so restina av dystinum var tað bert ein spurningurin um at halda munin niður til hoyvíkingarnar.



Ingi Olsen gjørdi 5 av málunum hjá VÍF í sigrinum á H71

Sum skilst úr Vestmanna, var ongantíð ivi um, hvørt av liðunum var tað betra. Tað tóktist tó, sum um leikararnir hjá heimaliðinum ikki alla tíðina vóru nóg hugsavnaðir um uppgávuna, og fleiri álopsroyndir vórðu tveittar burtur, tí menn ikki gjørdu sær nóg stóran ómak.

Betri næstu ferð

Hjá gestunum var tað serliga Halgir Dahl-Olesen, sum gjørdi um seg, og tað er einki at ivast í, at vónirnar hjá hoyvíkingum um kappingarárið eru nær tengdar at skotstyrki hansara. Hinvegin var merksivert, at Stefan Dorofte sat á beinkinum, eins og Olaf Vestergaard fyri fyrstu ferð hetta kappingarárið var at síggja á vøllinum.

Ivaleyst fara hoyvíkingar hetta árið at gera meira um seg, enn teir gjørdu seinasta kappingarár, og so er spurningurin, hvussu langt hetta fer at røkka. Móti VÍF var ein góður vilji ikki nóg mikið, men spurningurin er helst, um tað er nóg mikið hjá nøkrum øðrum liði, tí á pappírinum er VÍF í løtuni nógv besta liðið í landinum.

Enn er kappingarárið tó ungt, so framvegis kann nógv henda, og vestmenningar vita helst eisini, at teir ikki skulu selja skinnið ov tíðliga.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
VÍF: Sámal Joensen 7, John Zachariaseb 7, Agnar Joensen 6(1), Ingi Olsen 5(2), Harald Bjørgvin 2, Danut Negro 2, Martin Hummeland 2
H71: Halgir Dahl-Olesen 9(1), Annfinnur N. Debes 4(1), Johnny Djurhuus 3, Rolf Mouritsen 3, René Dahl-Olesen 3, Hallur Danielsen 2, Olaf Vestergaard 1
Brotskøst:
VÍF 5, H71 4
Útvísingar:
VÍF 6, H71 3
Diskvalifikatión:
H71 1 (3x2 minuttir)

VÍF-Sóljan 30-12

Sóljan følnaði

Uppflytararnir úr Vágunum vórðu settar so dyggiliga til viks, tá tær sunnudagin høvdu lagt leiðina um Vestmannasund

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Tríggjar teir fyrstu dystirnar hetta kappingarárið høvdu uppflytararnir úr Sóljuni fingið góð úrslit, og tí vóru vónirnar ikki heilt ongar, tá tær sunnudagin fóru til Vestmanna.

Tepur tap móti gull- og silvurvinnarunum frá í fjør, saman við einum sigri á Tjaldrinum boðaðu í øllum førum frá, at knotur vóru í liðinum, men hesu ferð vóru tær so dyggliga við undirlutan.

Bremsaðu stórskjúttanum

VÍF sendi nevnliga gestirnar avstað við einum sonnum stórtapi, og hóast tær hjá VÍF ikki tóktust heilt nøgdar um spælið, so kunnu tær ikki annað enn vera nøgdar um úrslitið.

Sum skilst, so var munurin á spælinum alla tíðina stórur, men á máltalvuni fór ikki at bragda fyrr ein seinasta korterið ella so.

VÍF hevði valt at dekka við einum skeivum eittara, sum skuldi taka broddin av vandamesta álopsvápninum hjá Sóljuni, Simonu Dziukgyte, og hetta eydnaðist eisini avbera væl.

Stórskjúttin, sum higartil hevur skotið meira enn helmingin av Sólju málunum, skeyt eisini hesu ferð helmingin av málunum, men hetta rakk tó ikki langt. Samlaða máltalið hjá uppflytarunum var 12, meðan VÍF liðið fekk ikki færri enn 30, og so var leyst og liðugt.

Skulu finna rútmuna

Sum nevnt, so var munurin tó ikki so stórur alla tíðina, men seinastu tjúgu minutturnar fingu gestirnir bert eitt mál, meðan heimaliðið skoraði ikki færri enn 14 ferðir.

Umframt at vinna sær enn tvey stig í posan, gav VÍF við greiða sigrinum eisini ábendingar um, at tær ætla at hava okkurt orðið at siga, tá heiðursmerkini skulu býtast.

Enn er tó langur vegur eftir á mál, men skal støði takast í einstaklingunum á liðnum, er lítið at ivast í, at tilfarið er gott.

Spurningurin er so, hvørt teir báðir venjararnir kunnu fáa allar at svinga í somu takt, men tað fer tiðin helst at vísa.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
VÍF: Fríða Marjunardóttir 9(1), Sóleyð Mikkelsen 7(2), Ioana Rapa 7, Nicoleta Radu 4, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3
Sóljan: Simona Dziukgyte 6(4), Hertha Simonsen 2, Elsba Egilstoft 1, Marjun Jørgensen 1, Sølja Nielsen 1, Jóhanna í Horni 1
Brotskøst:
VÍF 9, Sóljan 4
Útvísingar:
VÍF 1, Sóljan 3

Óli Johannesen og teir tóku øll á bóli:

AGF í n‡ggjum hami

Óli Johannesen var á vøllinum sí›sta korteri›, tá oddali›i› úr Lyngby var› sent aftur til Keypmannahavnar vi› stórtapi

Superliga
Jóannes Hansen

Hóast ta› ikki hevur sæ›st so nógv til ta›, so tykist viljin í Århus ikki at vera sørur fyri at bjarga fótbóltsflaggskipinum í b‡num. Higartil hevur hetta ikki sæst aftur í rei›um pengum, men sunnudagin var› ta› tiki› sum eitt tekin um vælvild, tá b‡rá›sforma›urin, Flemming Knudsen, sat aftanfyri mikrofonina og seg›i frá um mál og útskiftingar og hvussu ta› gekk a›ra sta›ni í superliguni.

Ove Christiansen, venjarin, hev›i fleiri spælarar tøkar hesa fer›, enn hann hevur havt leingi. Ta› hev›i m. a. vi› sær, at ta› ikki var pláss fyri Óla Johannesen ímillum teir fyrstu ellivu. Óli var á beinkinum. Tá eitt korter var eftir, kom Óli á vøllin fyri verjuspælaran Jesper Andersen. Tveir minuttir undan útskiftingini høvdu Óli og teir 3.364 ásko›ararnir veri› vitni til ársins mál í Århus. Í sambandi vi› fríspark 25 metrar úr Lyngby málinum, var› bólturin lyftur upp, og so heilflukta›i Dennis Siim, sum eftir leikbann var aftur í verjuni, dygst undir samankomingini.

Tá gjørdist stø›an 3–2, og korteri›, sum Óli var á vøllinum, var rættuliga hugaligt, um ta› ver›ur sæ› upp á ta› vi› AGF brillum. AGF skora›i tvær fer›ir og vann tískil 5–2. Seinastu átta dystirnar undan sunnudegnum hev›i AGF tapt sjey fer›ir.

N‡ggjan íblástur

Lyngby spældi sum eitt botnli›, og AGF spældi sum eitt oddali›, var ni›urstø›an í donskum fjølmi›lum.

Sigurin hev›i vi› sær, at AGF lyfti seg upp um ni›urflytingarstrikuna. Í sta›in datt Herfølge ni›ur um strikuna.

Í AGF halda teir, at umframt stigini so var ta› av alstórum t‡dningi, at spælararnir sta›festu bæ›i fyri sær sjálvum og ø›rum, at teir framvegis duga at spæla fótbólt.

Millum n‡ggju menninar á li›num hjá AGF var mi›vallarin Peter Degn, sum er ein gamal kenningur í felagnum. Seinastu tvey árini hevur hann veri› í Everton, har hann hevur spælt millum líti› og einki. Hann spældi í ein tíma, so orka›i hann ikki meiri sunnudagin. Honum restar dystarvenjing, og í AGF ivast teir ikki í, at hann ver›ur stórur styrkur, tá venjingarstø›an ver›ur betur, enn hon er nú.

Langt um leingi fingu teir hjá AGF aftur okkurt at fegnast um

Um AGF heldur fram, har sum teir sleptu sunnudagin, so ver›ur mett, at teir skjótt fara at sleppa undan ni›urflytingar hóttanini.

Stór europeisk uppgáva bí›ar:

Jákup er á veg til Grikkalands

Skaddi tummulin fer ikki at bila, so føroyski landsli›smálverjin hósdagin fer at fáa vart Herfølge máli› í UEFA Cup

Superliga
Jóannes Hansen

Jákup Mikkelsen var á ásko›araplássunum, tá Herfølge sunnudagin spældi 1–1 á heimavølli ímóti OB.

– Undir venjingini leygardagin fekk eg eitt spark í annan tummulin. Ta› hev›i nógva pínu vi› sær, tummulin gjørdist óli›iligur, og tískil var ta› ikki hugsningur um at spæla sunnudagin. Aftaná dystin móti OB var eg hjá læknanum, og hann mest sum gav mær lyfti um, at ta› ikki ver›ur nakar trupulleiki hjá mær at spæla í Athen hósdagin, sigur Jákup Mikkelsen.

Herfølge fer í dag úr Danmark og til Athen, har dysturin í UEFA Cup ver›ur ímóti AEK hóskvøldi›.

Jákup Mikkelsen rósar Claus Udengaard, sum loysti føroyska landsli›smálverjan av millum stólparnar ímóti OB:

– Hann hev›i fleiri gó›ar bjargingar, tá mótstø›umenn vóru leysir frammanfyri honum, sigur Jákup Mikkelsen.

Ta› skilst á donskum fjølmi›lum, at veikleikin hjá eykamálverjanum er, at hann ikki er nakar serligur fótbóltsspælari. Verjan plagar at hava ein gó›an fótbóltsspælara í málinum, men sunnudagin kundu teir ikki gera so nógv av at spæla aftur til málverjan, sum teir plaga at gera.

Jákup Mikkelsen skal hóskvøldi› verja máli› hjá Herfølge í Europa-Cup dysti í Athen

Málini

Herfølge stríddist rættuliga fyri søkini. Meistararnir eru undir ni›urflytingarstrikuni, og ta› kennist aftur í stu›linum, sum teir fáa frá ásko›arunum. Hann er nógv minni nú, enn hann var hugaligu dagarnar tí›liga í summar. Sunnudagin vóru bara 1.688 ásko›arar á Herfølge stadion. Teir frøddust um, at heimali›i› leg›i seg á odda í 34. minutti. Chris Hermansen, sum ikki hevur veri› sannførandi, sí›ani hann kom aftur úr AB, skora›i fyri a›ru fer› upp í slag. Hann snara›i um seg sjálvan í brotsteiginum og sendi flatt í máli›.

Á tímaslagnum javna›i OB vi› brotssparki. Herfølge málverjin tók beinini undan OB álopsmanninum, Søren Andersen. Álopsma›urin megna›i at koma á føtur aftur og senda bóltin í máli›, men dómarin bríksla›i fyri brotssparki. Í tí førinum var› hildi›, at dómarin gjørdi tvey mistøk. Anna› var, at hann ikki skuldi havt bríksla› fyri brotssparki, men heldur skuldi havt bí›a› og sæ›, hvussu stø›an fór at taka seg upp. Hitt var, at tá hann hev›i bríksla› fyri brotssparki, so skuldi hann ikki givi› málverjanum gula korti›, men heldur ta› rey›a, tí hann tók upplagdan málmøguleika frá OB.

Eingin Johan

Føroyski landsli›sma›urin Johan B. Hansen var ikki at síggja á OB li›num. Eftir at Johan hevur veri› fastur fúsur í OB verjuni í nógvu teimum seinastu dystunum, hev›i venjarin, Troels Bech, hesa fer› valt at hava Johan á beinkinum allar 90 minuttirnar.

Ta› var› ikki tosa› naka› serligt um, at Johan ikki var á li›num. Haraftur ímóti gjørdu donsku fjølmi›larnir nógv burturúr, at OB hev›i fingi› n‡ggjan málverja.

Tá danska landsli›i› var í Føroyum, var› nógv gjørt burturúr, at Jesper Christiansen, sum akkurát var komin í OB máli›, var eykamálverji hjá Peter Schmeichel. At Morten Olsen vísti 22 ára gamla málverjanum so stórt álit hevur havt vi› sær, at fleiri útlendsk feløg hava víst honum áhuga. Í sí›stu viku var› málverjin seldur úr OB og til Glasgow Rangers. Bæ›i málverjin og OB fingu fleiri milliónir burtur úr handlinum.

Hesa fer› stó› Ulrik Lind í OB málinum. Hann er omanfyri tveir metrar høgur, og í fyrstu atløgu tóktist ta› ikki hava serligan t‡dning, at OB hev›i skift málverjan út.